FO-710 Klaksvík
Postbox 19
Stangavegur 53
Tlf (298) 347114
Fax (298) 347205

# *Vegleiðing í ársenda fyri dos-klokku- & dos-lønarskipan 2025/2026*

Vit skulu skifta ár í lønarskipan við at nullstilla lønartotalar hjá løntakarum pr. 31.12. (Les víðari).

***Um*** vika 52 ikki fer ígjøgnum fyrr enn eftir 31.12, so skal ein nullstilla lønartotalar ***áðrenn*** ein koyrir viku 52.

**Løn, sum er TAKS í hendi eftir 30.12, hoyrir til 2026, ( hóast tað í bókhaldinum verður bókað sum skyldug løn 2025 ).**

## *Útskriva árslønaryvirlit í dos-lønarskipan*

Fyrst skulu vit útskriva eitt árslønaryvirlit (saldolista) yvir farna árið.

Vel XX fyri at sletta seinastu lønarkoyring.

Vel forrit IN og vel møguleika ”3” ella ”5”. (Bæði).
So ajourførir teldan nøkur útskrivingar index.

Vel forrit HE, vel J til bókstavaordan, vel ”1” fyri føðingardagsordan (P-tal), vel ”E” fyri árslønaryvirlit, set dagfesting til 31.12.2025 og J til at umleypa nullarar.
So útskrivar teldan ein lista í ptals-ordan yvir allar lønmóttakarar í árinum. Hetta yvirlitið skal stemmast av við eitt yvirlit, sum Toll- & Skatt sendir út fyrst í januar mánaða. Hetta yvirlit er í ptals-ordan.

Lønarskipanin ger samstundis eisini eina exportfilu ”ARSLON.x” (har x=firmanr). Hesa fílu kann ein importera inn í excel (åbn, søg i: AVRLON, alle filer, ARSLON.1, åbn, filtype afgrænset, filoprindelse MS-DOS, næste, semikolon, udfør, merk alt (klikk á cellu fyri vinstru [A]),trýst á formater-kolonne-autotilpas ..)

## *Nullstilla lønartotalar í dos-lønarskipan*

Tá vit standa við listanum (árslønaryvirlit) í hondini og eru vís í, at alt er í ordan, velja vit forrit NU, velja møguleika 5 (inntasta kotu) og skriva //
Síðan velja vit møguleika ”1” at nullstilla totalar. Teldan nullstillar síðan allar lønartotalar.
Nú er klárt at koyra nýggja árið.

Tey, ið nýta ALS fiskavirkisskipan, skulu kopiera sær ALSSKEMA.TXT fyri **2025-2035** inn, ***um tey ikki gjørdu hetta í fjør***. Henda fíla kann downloadast frá heimasíðuni ***www.nema.fo.*** Sí niðast á heimasíðuni undir ÁRSENDI 2025/26.
Filin skal leggjast inn í AVRLON\. Ein kann testa hana við at velja AJ og evt. vikunr **202534**. Um tíðarskeiðið kemur fram við dato osv., er filin komin uppá pláss.
(Um ein ivast í, hvat drev AVRLON\ liggur á, kann ein úti á skrivaraborðinum høgraklikkja á iconina fyri lønir og undir egenskaber kanna destination ella arbejdsbibliotek.)

## *Nullstilla bátatotalar í dos- lønarskipan*

Tey, sum nýta avrokningarskipan, skulu nullstilla bátahagtøl við at velja forrit AA, har vit síðan velja RS og møguleika 4) at útskriva bátahagtøl.

Síðan velja vit møguleika ”5” (stilla kotu) og skriva //.
Síðan velja vit møguleika ”8”, har vit nullstilla bátatotalar.

FO-710  Klaksvík
Postbox 19
Stangavegur 53
Tlf  (298) 347114
Fax (298) 347205

## *Skifta ár í dos-klokkuskipan*

Sjálvt um ein evt. mátti  nullstilla lønartotalar longu eftir viku 51 ella 52 í lønarskipan, skal onki gerast í ***klokkuskipan***, fyrr enn ein hevur aktiverað  seinastu vikuna í árinum  (52 ella 53) yvir í lønarskipanina.

Tástaðni skal ein í klokkuskipan fara inn í BR og velja ”1” fyri virki, velja ”1” fyri at broyta virkisstatus og seta  árstalið á niðastu linju  til  **2026**.  Á somu síðu skal hægsta skiftnummarið setast til  **52**.

Vit fara so aftur á forsíðu við at velja ”7”, og síðan velja vit ”2” fyri sáttmálar.

Skipanin dugir at rokna út leygar- og sunnudagar í árinum 2026, men ein má seta, hvørjir serdagar eru galdandi í 2026. Tað gera vit við at velja ”4” (serdatotabel), har vit seta

| | | | |
|---|---|---|---|
| 01.01 | 2 | | nýggjársdagur |
| 02.04 | 2 | | skírisdagur |
| 03.04 | 2 | | langi fríggjadagur |
| 04.04 | 4 | !! | leygardagur páskaaftan. (Hálvur frídagur leygardag) |
| 06.04 | 2 | | 2. Páskadagur |
| 25.04 | 4 | | flaggdagur. (Vanliga hálvur frídagur.) (Fellur uppá leygardag í ár). |
| 01.05 | 2 | !! | altjóða arbeiðaradagur. |
| 01.05 | 2 | | dýri biðjudagur |
| 14.05 | 2 | | Kristi himmalferðadagur |
| 23.05 | 4 | !! | leygardagur  hvítusunnuaftan. (Hálvur frídagur leygardag) |
| 25.05 | 2 | | 2. hvítusunnudagur |
| 05.06 | 3 | !! | grundlógardagur. (Vanliga hálvur frídagur.) |
| 28.07 | 3 | !! | ólavsøkuaftan.  Vanliga ½ frídagur í Havn. |
| | | | Uttanfyri Havnina mest vanligur arbeiðsdagur. Sostatt vekk úr yvirliti. |
| 29.07 | 2 | !! | ólavsøkudagur. Vanliga heilur frídagur í Havn. |
| | | | Uttanfyri Havnina mest vanligur arbeiðsdagur. Sostatt vekk úr yvirliti. |
| 01.11 | 2 | !! | alla halgannadagur. (Vanliga hálvur frídagur.) (Fellur uppá sunnudag í ár.) |
| 24.12 | **2** | !! | jólaaftan. |
| 25.12 | 2 | | jóladagur |
| 26.12 | 2 | | 2. jóladagur |
| 31.12 | **2** | !! | nýggjarsaftan. |

0=vanligir 1=leygard 2=halgidagur 3=hálvur dagur 4=hálvur leygardagur

( + at gera glopp millum linjur)
(  - at sletta linju)

***Hesir dagar og dagsløg eru bert vegleiðandi. Teir eru ikki líka allastaðni ( !! ) .***

Nýtir ein **fleiri** sáttmálar, má ein rætta serdatotabel í **øllum** brúktum sáttmálum (vanligt, dagvakt, kvøldvakt ….). Hetta kann eisini gerast við at kopiera datotabel úr sáttmála 0 til sáttmála 1 við at velja 7) Kopiera sáttmála frá nr. ”0” til nr. ”1” og seta ”8” fyri kotu og so endurtaka 7) frá  ”0” til ”2” og kotu ”8”....

Olivur Thomsen
Fart. +298 794223